# Kongalig vitjan í Havn



Kongaskipið Dannebrog legði at bryggju við Bursatanga í Havn. Stásiliga kongaskipið er frá 1932

**DROTNINGARVITJAN** Gjáramorgunin klokkan 9:15 legði kongaskipið Dannebrog at bryggju við Bursatanga í Havn.

Eirikur Lindenskov

Hennara háting Margreta drotning og hansara kongaliga hátign, Heindrikkur prinsur, komu í land, har Kaj Leo Johannesen, løgmaður, Dan Knudsen, ríkisumboðsmaður og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn tóku ímóti. Havnar Hornorkestur spældi »Kong Christian« og »Tú altfarga land mítt«.

Eftir at løgmaður hevði hildið røður, koyrdi fylgið av Bursatanga út í Tinganes. Ætlanin var annars, at kongshjúnini skuldu spáka um Kongabrúnna, út eftir Müllersbrúgv og út í Tinganes, men hetta var av ongum, kanska tí tað var eitt lítið slavið í veðrinum. Úr Tinganesi fór fylgið niðan í Løgtingið og haðani niðan í Hoyvíkar Kirkju.

Eftir tað varð vitjað í Skúlanum við Løgmannabreyt, og prinsurin var eisini og vitjaði Sjósavnið á Argjum og hjá Reyða Krossi í Vágsbotni. Eftir hesa vitjanina fór prinsurin ein túr við bjargingarbátinum Lív - sum eftir ein stimitúr sigldi prinsina inn á Burstanga - har bjargingarbáturin legið at kongaskipinum.

Í gjárkvøldið var ein var ein stásdøgurði á Hotel Føroyum.

eirikur@sosialurin.fo



Hendrikkur prinsur í føroyskum klæðum - og leðurhandskum - og drotningin veitra til teirra, sum komin eru saman at taka ímóti kongaligu gestunum



Kaj Leo Johannesen, løgmaður, Dan Knudsen, ríkisumboðsmaður og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn tókum ímóti



Kongaliga fylgi vitjar í Skanskapakkhúsinum í Tinganesi





Súsanna Danielsen, løgtingsstjóri, heilsar upp á drotningina, tá hon kom í løgtingið